betri
stýring
= størri
vinning

Starvslýsing

# Navision-ráðgevi og supportari til ERP-deildina hjá Nema




Í fleiri enn 30 ár hava vit støðugt ment loysnir til bókhald, roknskap og lønaravgreiðslu. Vit hava saman við føroyska vinnulívinum vaksið okkum størri og sterkari. Tørvurin á fíggjarstýring er støðugt vaksandi, og tí fara vit nú eisini at bjóða kundum okkara MS Dynamics NAV-skipanina (Navision). Saman við egnu forritunum, Lundin Financials og Lundin Løn, hava vit nú røttu loysnina til ein og hvønn tørv.

Nema vil vera varandi samstarvsfelagin, tá ið kundin leitar sær ráð um røttu fíggjarstýringsloysnina, tá ið hann fær sær nýggjar fíggjarstýringskipanir, ella tá ið hann mennir og dagførir verandi loysnir. Við støði í tørvinum hjá einstøku fyritøkuni bjóða vit eina viðkomandi og virðiskapandi tænastu.

Í Nema halda vit, at røtt ráðgeving og besta skipanin skapa frægasta úrslitið. Tí fara vit nú at bjóða bæði Lundin Financials og MS Dynamics NAV. Við hesum tryggjar Nema besta grundarlagið undir tí at finna røttu loysnina; bæði til einmans fyritøkuna og til størri fíggjarstýringsloysnir.

**Um størvini**
Í sambandi við víðkaða virksemið sóknast vit eftir tveimum dugnaligum starvsfólkum, ið skulu vera partur av deildini við fíggjarstýringsloysnum. Á deildini starvast sølufólk, ráðgevar, supportarar og mennarar.

Hjá Nema fert tú at arbeiða við stórum kundaskara, ið m.a. fevnir um framleiðslufyritøkur, kommunur, tænastufyritøkur og bókhaldsvirki.

Hevur tú áhuga í fíggjarstýring? Hugsar tú í loysnum, og sært tú fyrimunir í at gera arbeiðsgongdir smidligari og meira effektivar? So er tað kanska tær, vit leita eftir.

Umsóknir við møguligum prógvum skulu áðrenn 12. desembur sendast til:

Nema, HR-deildin, Postsmoga 109, FO-110 Tórshavn.

ella umvegis heimasíðu okkara á www.nema.fo/starvsmøguleikar

Umsóknir og fyrispurningar verða viðgjørd í trúnaði. Vilt tú hoyra meiri um størvini, kanst tú seta teg í samband við Árna Ellefsen, stjóra, á telefon 347 110 ella arel@nema.fo.

**Sølufólk/ráðgevi**
Sum sølufólk/ráðgevi stendur tú fyri ráðgeving, kravfesting og at samskipa fíggjarstýringsloysnir til kundar okkara. Tú hevur áhuga í fíggjarstýring, tú hugsar í loysnum, og tú sært fyrimunir í at gera arbeiðsgongdir smidligari og effektivari. Tær dámar at hava samband við kundar og hjálpa teimum at finna bestu loysnina til júst teirra tørv.

Tú hevur royndir í fíggjarstýring/bókhaldi og/ella grannskoðan. Tú hevur fyrimun, um tú hevur viðkomandi royndir í Navision og/ella Lundin Financials.

**Supportari til Dynamics NAV (Navision)**
Sum partur av support-toyminum á deildini við fíggjarstýringsloysnum samstarvar tú við ráðgevarnar og kundarnar, tá ið nýggjar skipanir verða settar í verk, verandi skipanir verða viðlíkahildnar, og tá ið verandi loysnir og mannagongdir verða mentar.

Í dagliga starvinum kanst tú vænta at hava nógv samband við kundar og arbeiða tætt saman við forritarum og ráðgevum.

Royndir við MS Dynamics Nav ella Navision er krav til hetta starv.

Postboks 109 | 110 Tórshavn | 347 347 | samband@nema.fo | www.nema.fo

nema

SENDISTOVAN